# Sjón fyri søgn



JASPUR VANG
Løgtingsmaður

**Í landspolitikki eins og í øllum øðrum lívsins viðurskiftum er alneyðugt stundum at steðga á, hugsa seg um og at læra av tí, sum farið er, og ikki endurtaka gjørd mistøk**

Tá sjálvskapta kreppan herjaði land okkara fyrst í 1990-unum, sprændi ríkisfelgsskapurin milliardir inn í bankar ogra og í landskassan. Úrslitið varð, sum vit øll vita, at føroyskir bankar og landsbúskapurin mentist ómetaliga nógv og skjótt fylgjandi árini. Nú heimsumfatandi kreppa hóttir vælferð okkara, mugu vit enn einaferð ásanna, at samhaldsfestið í ríkisfelagsskapi tryggjar okkara landsbúskap og harvið okkara framtíðar vælferð.

**Køvandi ráksnúni**
Søguliga gongdin vísir okkum, at tá búskaparligt viðrák er, fáa fullveldisflokkarnir vind í seglini og leita saman við teimum flokkum, sum í spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya snúgva sær við ráknum, alt eftir um búskaparligt við- ella mótrák er í samfelagnum Úrslitið hevur verið, at m.a. ríkisveitingin varð skerd og fastfryst, soleiðis at uml. 3 milliardir krónur eru søplaðar burtur seinastu 6 árini. Miðvíst hava loysingarflokkarnir harumframt økt rakstrarútreiðslur landskassans í ólukku mát. Hettar við tí fyri eyga at fyrireika føroyska samfelagið til enn fleiri yvirtøkur - alt við fullveldi fyri eyga. Harumframt er øgilig fíggjarorka og politisk orka annars løgd í at seta kílar í ríkisfelagsskapin. Nevnast kunnu m.a. "Hvítabók", "Grundlógarálitini" og landsumfatandi marknaðarføringin/indoktrineringin av hesum verkum.

Tá tað so búskaparliga rekur upp í ættina, seglini skulu repast og rætta kósin stingast út í kortið av nýggjum, soleiðis sum tað hendi fyrst í 1990-unum og aftur nú, tá heimsumfatandi fíggjarkreppa rakar okkara samfelag, umframt at vit hava kreppu í pørtum af okkara høvuðsvinnu, finna vit styrki og loysnir í samhaldsfasta ríkisfelagsskapinum. Bankapakkarnir eru feskastu prógvini um hettar.

Sum víst á omanfyri, sveiggjar føroyski búskapurin ikki einans við skiftandi konjunkturum, men verður hákonjunktururin, framgongdin í búskapinum og samfelagsmenningin søplað burtur í ábyrgdarleysari nationalismu.

Sambandsflokkurin hevur ferð eftir ferð ávarað ímóti fylgjunum av slíkum afturhaldssinnaðum og køvandi ráksnúni. Nú prógvar søguliga gongdin enn einaferð, at sjón gongur fyri søgn.

Loysingarflokkarnair við Tjóðveldi á odda finnast í hesum døgum at neyðugum loysnum og útreiðslutálmandi átøkum, sum eru neyðugar fylgjur av afturhaldssinnaðum og ábyrgdarleysum loysingarpolitikki. Slíkur andstøðupolitikkur prógvar, at hesir flokkar meta loysingina hava størri týdning enn vælferð og framburð í landinum.

**Bankapakkarnir**
Við fyrra bankapakkanum vórðu m.a.innlánini í bankunum í ríkinum tryggjað. Um føroysku bankarnir ikki vóru partur av hesum átaki, er eingin ivi um, at fólk høvdu tikið sín pening út, ella flutt innistandandi á tryggari stað. Eitt slíkt "run" á bankarnar hevði skjótt tikið beinini undan lutfalsliga smáu føroysku bankunum.

Við seinna bankapakkanum varð m.a. omanfyri nevnda trygd fyri innistandandi longd úr tveimum upp í fimm ár, eins og bankarnir nú fingu í boði at økja um sín ábyrgdarpening, fyri á tann hátt um neyðugt at konsolidera seg betur og harvið hava betri møguleikar at fíggja m.a.tað vinnuliga virksemið, sum er ein fortreyt fyri øllum framburði.

**Útflutningstrygdarskipan**
Í samband við seinna bankapakkan vórðu 20 milliardir krónur settar av til eksportkreditlán, sum føroyskar útflutningsfyritøkur væntandi fáa lut í, um tær ynskja tað, umframt at føroyskar útflut-ningsfyritøkur verða fevndar av útflutningstrygda rskipanina hjá Eksport Kredit Fonden, sum veitir útflutningslán og útflutningstrygd. Hendan skipan kann verða við til at tryggja m.a. føroysku fiska-útflytarunum, at teir fáa pening fyri útflutningsvøru sína, nú fiskakeyparar í útlondum ikki eru eins tryggir gjaldarar og undan búskaparkreppuni, samstundis sum bankarnir eru varnir við at veita útflutningslán og útflutningstrygd.

Í Føroyum er ikki fíggjarorka at fíggja nakran serføroyskan bankapakka, eins og skotbráið at fáa í lag eina útflutningstrygdarskipan er alt ov stutt.

Útreiðslutálmandi, men stimbrandi fíggjarlóg fyri 2009.

Skotbráið at taka upp eftir CHE-samgonguna og gera fíggjarlóg fyri 2009 var stutt. Hóast døpur búskaparlig útlit, varð hildið fast við útbyggingingina av okkara samfelag og varð skipað soleiðis fyri, at óneyðugur stígur ikki kom í byggivinnuna, við harav fylgjandi arbeiðsloysi. Tí varð m.a. nýtt Hvalbiarberghol sett á fíggjarlóg landsins fyri fyrstu ferð, soleiðis at tann fyri landsbúskapin so týdningarmikla vinnan í hesum parti av landinum kann fáa betri karmar at virka innan, eins og hildið varð fast við útbyggingarnar av Landssjúkrahúsinum, umframt at fyrireikingar at byggja skúladepil í Marknagili eru í gongd - bert fyri at vísa á nøkur dømi.

Við atliti til búskaparligu útlitini, varð útreiðsluhækkingin frá 2008 til 2009 á fíggjarlógini fyri 2009 tálmað við uml. 100 mió. kr. At almennir stovnsleiðarar og fakbólkar royna at kalla hettar sparingar, verja borg í fjølmiðlunum og finnast at hesari neyðugu útreiðslutálman, er væl skiljandi og fyri so vítt eisini teirra skylda. Flestu okkara skilja – og góðtaka hóast alt innast inni, at vit øll mugu bera part av teirri byrðu, sum heimsumfatandi búskaparkreppan og teir trupulleikar, sum eru í okkara høvuðsvinnu, leggja á okkum.

**Niðurstøða**
Tað er so ómetaliga nógv skjótari og lættari at finnast at og bróta niður, enn tað er at vera konstruk-tivur og byggja land. Tí er tað so umráðandi at síggja veruleikan í eyguni, læra av søguligu gongdini og gjørdum mistøkum, fyri síðani at hyggja frameftir, gagnnýta hákonjunktur, tá hesin er, og alsamt byggja upp og styrkja samhaldsfestið millum londini. Við ábyrgd av framtíðini hava vit bæði í upp – og niðurgagnstíðum skyldu til, í felagsskapi, at skapa framburð og varandi virðir. Møguleikarnir liggja opnir fyri okkum, m.a.tá tað snýr seg um samstarv innan gransking, vinnumenning, á uttan-ríkispolitiska økinum og á útbúgvingarøkium. Vit eiga harumframt at kanna eftir, hvørjir møgu-leikar liggja í møguligum ES-limaskapi, heldur enn at stinga høvdið í sandin eins og strutsurin og loysingarflokkarnir.

Avbjóðingarnar eru stórar, nú kreppa hóttir, men møguleikarnir eru størri – bert vit vilja gagnnýta teir.

# Boð frá hægsta stað: Brót bara lógina!



SJÚRÐUR SKAALE

**Umboðsmaðurin verður ignoreraður. Eidesgaard floytaði t.d. á lógloysið í Tvøroyrar Kommunu. Og Kaj Leo hevur einki gjørt við tað, hóast greiðar ordrar frá løgtinginum. Hetta máar støðið undan rættartrygdini**

Fólk, sum hava fingið myndugleika, skulu umsita hann eftir greiðum reglum - ikki eftir egnum tykki.

Tann varðin, vit ganga eftir, skal vera lógin - ikki korruptión og nepotisma.

Øll skulu ikki vera líka – men øll skulu vera líka fyri lógini.

Hetta er ikki ein sjálvfylgja. At vit hava lógir merkir ikki av sær sjálvum, at lógirnar verða fylgdar. Men hvør skal hava eftirlit við, at almennir myndugleikar halda tær lógir, teir skulu virka eftir?

Tað kunnu sjálvandi ikki vera myndugleikarnir sjálvir. Og tí fingu vit - eins og flest onnur lond - okkara Umboðsmann í 2001.

**Má takast í álvara**
Umboðsmaðurin hevur sera víðar heimildir í sínum eftirliti við landsins myndugleikum. Hann er hevjaður uppum alla vanliga fyrisiting.

Men umboðsmaðurin hevur ikki heimild at døma sjálvur. Myndugleikin skal liggja í hansara trúvirði. Tað, hann sigur, skal vera so væl grundað, at tað snøgt sagt má og skal takast í álvara.

Verður tað kortini ikki tikið í álvara tá umboðsmaðurin vísir á lógarbrot, verður støðið máað undan rættartrygdini. Tí so síggja myndugleikarnir, at tað ber til at bróta landsins lógir uttan, at tað fær nakra avleiðing.

Og tá er betur ongan umboðsmann at hava.

**Tvøroyrar Kommuna í serflokki**
Í 2007 gav umboðsmaðurin fleiri álvarsamar átalur, sum ikki fingu nøktandi avleiðingar.

Og tað er serliga ein myndugleiki í landinum, sum vísir seg at leggja líka í, hvat umboðsmaðurin sigur: Tvøroyar Kommuna.

Henda kommunan fekk álvarsama átalu, tá avloysari fyri leiðaran á Frítíðarskúlanum varð settur, og týðulig tekin vóru um nepotismu í málsviðgerðini.

Og í 2007 fekk kommunan aftur álvarsama átalu í sambandi við setan av brunaumsjónarmanni.

**Vit kenna umsøkjararnar...**
Sambært frágreiðing umboðsmansins um hetta mál, er heilt týðuligt, at tað ikki vóru lógir og reglugerðir, sum vóru avgerandi fyri setanina. Tað vóru persónar.

Og hetta helt leiðslan í kommununi vera í fínasta lagi!

Tá so umboðsmaðurin kom inn í málið, framdi kommunan ein klassiskan leik fyri at verja seg: Hon leyg! Fyrst leyg hon uppá fyrrverandi sløkkiliðsleiðaran, og síðani leyg hon uppá leiðaran fyri Brunaumsjón landsins!

Tá kommunan skuldi verja óreglusemið í sambandi við setanarsamrøðurnar í málinum, segði hon við umboðsmannin, at "*Kommunalu starvsfólkini kenna annars umsøkjararnar so mikið væl frá lokalsamfelagnum, at kommunan ikki metir, at starvsfólkasamrøðan í sjálvum sær gav kommununi avgerandi nýggja vitan í mun til tað, sum sjálv umsóknin gjørdi*".

Kommunalu starvsfólkini kenna umsøkjararnar frá lokalsamfelagnum! Tað er tað, sum er avgerandi! Tað sigur kommunan sjálv! Og tað sigur hon í einum verjuskrivi til umboðsmannin!

Hetta er heilt ótrúligt. Og tað er ikki løgið, at Tvøroyrar kommuna fekk sera álvarsamar átalur frá umboðsmanninum. Tá hann lýsti framferðina hjá kommununi, nýtti hann m.a. hesar vendingar: "*sera átaluvert*", "*tað er atfinningarsamt*", "*óskipað viðurskifti*", "*als ikki nøktandi*", "*alt ov long viðgerðartíð*", "*álvarslig brek við viðgerðini*".

Kortini hevur kommunan síðani púra arrogant latið akkurát sum luft. Hon ásannar ongan feil, og maðurin, sum hevur verið fyri órætti, fær onga umbering!

**Landsstýrið gjørdi einki**
Umboðsmaðurin sendi frágreiðingina um málið til landsstýrismannin við kommunumálum. Men hann gjørdi einki.

Eisini táverandi løgmaður, Jóannes Eidesgaard, fekk frágreiðingina. Men eisini hann læt akkurát sum luft.

Harvið blástemplaði undanfarna ABC-landsstýrið tey lógarbrot, sum Tvøroyrar Kommuna framdi.

Mann kundi ikki annað enn hugsa, at ein orsøk til hetta var, at leiðslan í kommununi og leiðslan í landsstýrinum hoyrdu til ein og saman flokk. Altso at talan var um klassiska korruptión.

**Haldið kjaft!**
Við einki at gera sendi Jóannes Eidesgaard eini ógvuliga greið boð borgararnar á Tvøroyri: Uppliva tit órætt, so haldið kjaft við tí!

Tí ein persónur sum stígur fram, og torir at klaga um ein almennan myndugleika, setir seg sjálvan í skotmála. Tað kann vera eitt stórt offur – men at nøkur gera tað, er við til at verja rættartrygdina.

Vit hava tørv á fólki, sum tora hetta.

Men tá hesi somu fólk síggja, at tað ongar sum helst avleiðingar fær, at ein myndugleiki brýtur landsins lógir, so virkar skipanin øvut. So verður úrslitið ein staðfesting av, at tað er í lagi at bróta landsins lógir.

Og hvør skal trína fram og gera vart við óreglusemi, tá niðurstøðan, eftir at óreglusemið er staðfest, er, at tað er í ordan? At tað ongar avleiðingar fær?

Maðurin, sum í hesum føri tók eitt stig fyri rættartrygdina og klagaði Tvøroyrar Kommunu, segði soleiðis við Dimmalætting 10. november "*Antin eigur løgtingið at gera nakað við tær niðurstøður, sum umboðsmaðurin kemur við, ella eigur hann at vera avtikin. Tað, sum hendir í løtuni, er at halda fólk fyri gjøldur, tí vit brúka tíð og orku til at kæra, men tað fær ongar avleiðingar fyri tann, sum brýtur lógina.*"

Frustratiónin er skiljandi. Og sleppa myndugleikarnir at ignorera umboðsmannin, so doyr stovnurin av sær sjálvum, tí fólk fara at halda uppat við at nýta hann. Eingin vil gera seg sjálvan til láturs.

**Løgtingið krevur atgerð**
Tá løgtingið í november viðgjørdi frágreiðing umboðsmansins fyri 2007, var tí eitt greitt krav sett landsstýrinum: Bæði hendan og hinar álvarsomu ákærurnar skulu hava fylgjur!

Hetta er sjálvsagt. Løgtingið má krevja, at tess egni Umboðsmaður verður tikin í álvara.

Stutt eftir spurdi eg so løgmann, hvat hann hevði gjørt við málið. Hann svaraði 20. november, at "*Eg vil tí tryggja, at landsstýrisfólkini taka átalurnar frá Umboðsmanninum til eftirtektar og taka neyðug stig.*"

Tað ljóðaði nú gott. Men tá eg spurdi aftur meira enn tveir mánaðir seinni, vóru framvegis eingi stig tikin.

Tjóðveldi fer sjálvsagt at fylgja málinum. Tí verður Umboðsmaðurin ignoreraður, eru boðini greið: Tað er í lagi at bróta lógina. Og tann, sum klagar um lógarbrot, kann enda sum rukka sjálvur!